# Oljufeløgini hava pumpað meira pening í Lopraholið



**Øll nitjan oljufeløgini, ið eru felags um boringina, eru samd: Tey vilja hava upp aftur fleiri áhugaverdar upplýsingar úr boriholinum, hóast tey mugu gjalda 5 mió. krónur aftrat.**

DIA MIDJORD

Tveir amerikanskir serfrøðingar eru farnir í holt við at fáa bilbukt við »fiskin«, sum er í boriholinum í Lopra. Men áðrenn teir fáa bilbukt við »fiskin«, mugu teir fáa bilbukt við veðrið, sum hevur forðað teirra arbeiði seinastu dagarnar.

Arne Rosenkrans Larsen frá Dopas upplýsir, at teir mugu arbeiða nakrar dagar fyri at loysa henda trupulleikan. Hann sigur víðari, at innan oljuøkið verður ein tílík forðing kallað ein »fiskur«. Henda málberingin stavar upprunaliga frá málinum hjá oljuarbeiðarum úr Texas og øðrum støðum í USA.

– Ein »fiskur« er nakað, sum skal fiskast upp úr boriholinum, sigur hann.

Arne Rosenkrans Larsen sigur, at fæst gongd aftur á boringini, so verður arbeiðið liðugt, áðrenn hesin mánaðin er úti.

Hann leggur aftrat, at tað framvegis er sera áhugavert at bora í Lopra. Hann vísir í hesum sambandi á, at tað er ikki av tilvild, at oljufeløgini tvær ferðir hava lagt pengar á borðið, tá forðingar hava verið.

# Michael kom tá avtornaði

**Fyrrapartin mánadagin lendi amerikanski gospelsangarin Michael W. Smith loksins í Vágum.**

NICLAS JOHANNESEN

Klokkan 11.00 mánadagin lendi Michael W. Smith og fylgi í Vágum. Sostatt bleiv konsertin í Runavík kortini veruleiki. Vandi var annars fyri, at alt bleiv avlýst.

Upprunaliga skuldi konsertin vera sunnukvøldið, men onki Maerks flogfarið lendi ikki í Vágum sunnudagin, og so varð tann konsertin av ongum.

Men Michael W. Smith hevði eisini mánadagin til taks. Og tá bar til.

Framførslan hjá amerikanska sangarnum man vera ein tann størsta í Føroyum nakrantíð, tá hugsað verður um pall, ljóð og ljós. Sjálvt TOTO, sum høvdu rímmarkonsert á Hálsi fyrr í summar, høvdu ikki so nógv ljós við sum amerikanski sangarin.

Hinvegin, so mundi allarhelst knipa hjá Michael W. Smith at lokka so nógv fólk frá húsum. Tað ljóðaði, at okkurt um 900 atgongumerki vóru seld í forsølu. Um 1600 føroyingar hoyrdu TOTO, tá bólkurin vitjaði.



Michael W. Smith hevði stórfingna konsert í Runavík mánakvøldið

Dimmalætting
– góðar lesnaður
– altíð við tí nýggjasta
– fer í næstan hvørt hús í Føroyum

